ISBN 99918-60-00-2

# Hækkandi oljuprísir, djúpvatnstrolarar og møguligar avleiðingar fyri Suðuroynna

Bogi Mortensen og Dennis Holm

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 10/2006**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. Kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

## Innihaldsyvirlit

Inngangur ........ 3
1. Um djúpvatnstrolararnir ........ 5
Búskaparligi týdningurin ........ 6
Avleidda virksemi ........ 7
Týdningurin fyri flaka- og fiskavirkir í Suðuroynni ........ 7
Týdningurin fyri tænastuvinnuna í Suðuroynni ........ 12
Djúpvatnstrolararnir menningarmøguleiki í øðrum høpi eisini ........ 13
2. Høgu oljuprísirnir og djúpvatnstrolararnir ........ 15
Ávirkan á raksturin ........ 16
Krøv til nøgd og prísir, um oljuprísurin verður 4,00 kr. pr. litur ........ 18
3. Tillagingar – hvørjir møguleikar eru? ........ 20
Veiðunøgd og prísir ........ 20
Produktmix ........ 21
4. Suðuroyggin sum feskfiskadepil? ........ 23
Avskipingarmøguleikarnir ein forðing ........ 23
Aðrir møguleikar ........ 25
Tungolja, partroling, stuðul ........ 26
Samandráttur ........ 28
Djúpvatnstrolararnir stóran týdning fyri Suðuroynna ........ 28
Høgu oljuprísirnir ein vandi ........ 30
Høgu oljuprísirnir leggja trýst á djúpvatnstrolararnir ........ 30
Tillagingarmøguleikar ........ 31
Bókmentir og keldur ........ 33

## Inngangur

Eitt sera aktuelt evni, ið hevur ávirkan á bæði húsarhald og vinnulív í hesum døgum eru teir alsamt hækkandi oljuprísirnir. Hækkingin í oljuprísunum hevur serliga verið stór hesi seinastu 2 árini, og ongin ábending er um, at prísirnir fara at lækka aftur í næstu framtíð, men heldur hinvegin, at teir framvegis fara at hækka í komandi tíðum.

Orsøkin til hesar metingar er, at framleiðslan og harvið útboðið av olju er ov lítið í mun til eftirspurningin. Tað, ið ger støðuna serliga trupla, er, at framleiðslan upp á stutt sikti ikki kann økjast stórt meira. Eftirspurningurin er hinvegin vaksandi, og er m.a. hetta við til at trýsta oljuprísin upp. Og tá so onkur minni ella størri náttúru- ella mannaskapt kreppa stingur seg upp og hevur ávirkan á oljuframleiðsluna – sum vit t.d. hava sæð eftir ódnina í Meksikanska Flógvanum í fjør og viðv. kreppuni í Iran í mars og apríl í ár – so fara prísirnir upp.

Fyri eitt land sum Føroyar er støðan við hækkandi oljuprísum sera aktuell. Føroyar brúka nógva olju í mun til íbúgvaratalið. Hetta serliga orsaka av, at høvuðsvinnan, fiskivinna/fiskiskapur, er sera oljuorkukrevjandi, men eisini er mest sum øll privata orkunýtslan oljukrevjandi bæði beinleiðis og óbeinleiðis, við tað at flest øll húsarhald brúka olju til upphiting o.a., og at elveitingin í stóran mun verður framleidd við olju.

Tann parturin av fiskiflotanum undir Føroyum, ið brúkar mest olju, eru teir stóru lemmatrolararnir ella djúpvatnstrolararnir, sum teir vanliga verða nevndir. Teir flestu av djúpvatnstrolarunum eru heimahoyrandi í Suðuroynni ella hava tilknýti til Suðuroynna á tann hátt, at manningin er úr oynni, og/ella at teir landa mest sum alla veiðuna í oynni. Hetta merkir sostatt eisini, at djúpvatnstrolararnir á nógvar ymiskar mátar hava stóran týdning fyri Suðuroynni, bæði beinleiðis og óbeinleiðis.

Vit hava seinastu árini sæð, hvussu hækkandi oljuprísir hava ført við sær, at føroyski rækjuflotin kom í stórar trupulleikar, og er talið av rækjuskipum í dag minkað niður í onki samanborið við støðuna fyri nøkrum árum síðani. Hækkingin í oljuprísunum hevur sjálvsagt eisini stóra ávirkan á djúpvatnstrolararnir. – Og við tað, at hesin parturin av fiskiflotanum í stóran mun er avmarkaður til at hava tilknýti til eitt geografiskt øki í

landinum, so er tað eisini relevant at gera eina lýsing av týdninginum, djúpvatnstrolararnir hava fyri Suðuroynna. – Og harvið eisini gera eina meting av, hvørjar avleiðingarnar í ringasta føri kunnu verða, um so er, at oljuprísirnir hækkað so nógv, at tað ikki er lønsamt hjá djúpvatns-trolaraflotanum at fara til fiskiskap og flotin verður lagdur.

Hendan frágreiðingin er grundað á hagtøl, roknskapir hjá djúpvatnstrolarunum, eina kanning millum flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni, umframt samrøður við virkisleiðarar á flaka- og fiskavirkjum í Suðuroynni og reiðarar og skiparar á djúpvatnstrolarum.

# 1. Um djúpvatnstrolararnir

Tað eru í dag 12 djúpvatnstrolarar í landinum[1], sum einamest fiska undir Føroyum. Av teimum eru 9 heimahoyrandi í Suðuroynni. Umframt hetta verður Brestir, sum er heimahoyrandi í Tórshavn, eisini mannaður í Suðuroynni.

Skilt verður ímillum stórar og minni djúpvatnstrolarar – hetta grundað á maskinorku og støðd á skipinum – og eru tað 8 stórir djúpvatnstrolarar og 4 minni djúpvatnstrolarar (í yvirlitinum niðanfyri s=stórur; m=minni).

| **Tvøroyri** | **Hvalba** | **Sørvágur** |
|---|---|---|
| Phoenix (s)<br>Rankin (s)<br>Rasmus Effersøe (s)<br>Suðringur (s) | Niels Pauli (s)<br>Steintór (s)<br>Sjagaklettur (m)<br><br>**Vágur**<br>Roc Amadour (s)<br>Sancy (m) | Vesturskin (m)<br><br>**Tórshavn**<br>Vesturvarði (m)<br>Brestir (s) |

**Talva 1. Yvirlit yvir djúpvatnstrolarar í apríl 2006**

Gongdin í Suðuroynni, hvat viðvíkur slag av fiskiskipum, hevur tey seinastu ártíggjuni verið merkt av, <u>at fiskiflotin er vorðin spesialiseraður innan djúpvatnstrolarar</u>. Í dag er hetta meiri sjónligt enn nakrantíð, og eru 9 av teimum 16 fiskiloyvunum[2], sum vóru í Suðuroynni í apríl í 2006 loyvir til djúpvatnstrolarar.

Framleiðslan á teimum stóru flaka- og fiskavirkjunum í Suðuroynni hevur eisini í nógv ár verið tengd at júst teimum fiskasløgum, sum djúpvatnstrolararnir fiska. Somuleiðis er eisini ment ein tænastuvinna í oynni, sum í ávísan mun hevur lagt seg eftir at veita tænastur til djúpvatnstrolararnir.

[1] Fram til mai mánað í 2005 vóru tað tó 13 djúpvatnstrolarar, íroknað Mýling úr Havn. Men 16. mai 2005 varð Mýlingur ásigldur, og stutt eftir varð hann seldur av landinum – tað var tó longu ætlanin at selja Mýling og keypa nýtt skip ístaðin, áðrenn Mýlingur varð ásigldur. Enn er onki skip komið ístaðin fyri Mýling, sum PF Kimbil í Havn átti (kelda: www.portal.fo). Vert er eisini at leggja til merkis, at ein partur av manningini umborð á Mýlingi var úr Suðuroynni.

[2] Her verður bara hugsað um fiskiloyvir til skip og ikki til teir smærri útróðrarbátarnar, sum eru í oynni.

### *Búskaparligi týdningurin*

Beinleiðis eins og óbeinleiðis hava djúpvatnstrolararnir stóran búskaparligan týdning fyri Suðuroynna. Manningartalið á djúpvatnstrolarunum er vanliga 13 mans[3]. Tilsamans eru sostatt umleið 130 mans úr Suðuroynni umborð á teimum 12 djúpvatnstrolarunum, einamest umborð á teimum 9 djúpvatnstrolarunum, sum eru heimahoyrandi í Suðuroynni, og umborð á Bresta.

Sambært Ársfrágreiðingini hjá Føroya Fiskimannafelag fyri árið 2005 (www.fiskimannafelag.fo) var miðal manningarparturin hjá djúpvatnstrolarunum tilsamans umleið 400.000 kr. Í miðal eru tað 16 manningarpartar knýttur at hvørjum skipi[4], og merkir hetta sostatt, at hvørt skipið hevur havt umleið 6,5 mio. kr. í lønútgjaldingum í 2005. Umframt manningarpartin, so hava flestu djúpvatnstrolarar eisini ein reiðara og/ella eina umsiting, og harafturat hava fleiri skip maskinmenn á landi, sum eru løntir beinleiðis av reiðaríunum.

Sum nevnt eru 10 av djúpvatnstrolarunum mannaðir[5] í Suðuroynni og merkir hetta sostatt, at talan er um eina lønarútgjalding á tilsamans 65 mio. kr. býttar á umleið 130 mans. Hetta merkir so aftur, at talan er um eina beinleiðis ávirkan á eini 100-130 húsarhald í Suðuroynni, og tá eru reiðari, umsiting og maskinmenn ikki taldir við.

Í 2005 forvunnu tilsamans 351 fiskimenn í Suðuroynni góðar 111 mio. kr. – ein miðal inntøka uppá góðar 315.000 kr. Teir umleið 130 menninir umborð á djúpvatnstrolarunum forvunnu sum sagt 65 mio. kr. í 2005, ella nærum 60% (58,5%) av samlaðu lønarútgjaldingunum til fiskimenn í Suðuroynni. Hetta hóast manningarnar umborð á djúpvatnstrolarunum bert taldu 37% av samlaða talinum av fiskimonnum í Suðuroynni (Kelda: Hagstova Føroya, apríl 2006).

---

[3] Men er tað tó ikki óvanligt, at skipini í ávísum tíðarskeiðum, tá lítil fiskiskapur er, hava færri enn 13 mans umborð.

[4] 16 partar býttir á 13 mans, tí skiparin, stýrimaður, maskinmenn og kokkur fáa meiri enn 1 part.

[5] Uttan iva eru fólk úr øðrum pørtum av landinum umborð á djúpvatnstrolarunum, ið eru heimahoyrandi í Suðuroynni. Suðringar eru tó eisini við hinum djúpvatnstrolarunum, so sannlíkt er talan um, at suðringar mannað tilsamans 10 djúpvatnstrolarar.

Eisini fyri inntøkurnar hjá kommununum í oynni hava djúpvatnstrolararnir stóran týdning. Í 2004 vóru skattainntøkurnar hjá kommununum í Suðuroynni smáar 109 mio. kr. (www.hagstova.fo). Inntøkurnar hjá manningunum umborð á djúpvatnstrolarunum vóru tilsamans umleið 62 mio. kr. í 2004. Í miðal var kommunuskattaprosentið í Suðuroynni umleið 21%, og var tann kommunala skattainntøkan frá djúpvatnstrolarunum sostatt umleið 13 mio. kr. – ella umleið 12% av samlaðu skattainntøkuni hjá kommununum í Suðuroynni.

### *Avleidda virksemi*

Umframt beinleiðis ávirkan, so hava djúpvatnstrolararnir eisini eina óbeinleiðis ávirkan, tvs. at tað stendst eitt ávíst avleitt virksemi av, at djúpvatnstrolararnir eru heimahoyrandi í Suðuroynni. Sum nevnt fevnir tað avleidda virksemi um virksemi á flaka- og fiskavirkjum, virksemi innan tænastuvinnuna, og hartil er eisini eitt ávíst virksemi í samband við bunkring og proviantering.

### Týdningurin fyri flaka- og fiskavirkir í Suðuroynni

Trý ártíggju við djúpvatnstrolarum í Suðuroynni hava gjørt, at flaka- og fiskavirkini í oynni í ávísan mun hava lagt seg eftir at framleiða fisk, sum hesir trolarar fiska. Framleiðslan á flaka- og fiskavirkjunum er sostatt í ávísan mun tengd at djúpvatnstrolarunum.

Í tíðarskeiðinum áðrenn kreppuna fyrst í 1990unum, áðrenn Føroya Fiskavirking varð stovnað, varð at kalla øll veiðan hjá djúpvatnstrolarunum løgd upp í Suðuroynni, í Hvalba, á Tvøroyri ella í Vági. Talan var um eitt fast tilknýti millum virkir og trolarar, og var í fleiri førum talan um, at eigararnir av virkjum og trolarum vóru teir somu. Hetta varð tó broytt við kreppuni fyrst í 1990unum, tá stovnanin av Føroya Fiskavirking førdi við sær eina sundurskiljing av virkjum og skipum, har flestu flaka- og fiskavirkini vórðu savnaði í Føroya Fiskavirking, meðan skipini (fleiri teirra eftir húsagang) fingu nýggjar eigarar ella vórðu seld av landinum.

Um sama mundið (í 1992) varð Fiskamarknaður Føroya eisini stovnaður. Og við hesum varð eisini skapt ein skipan, sum gjørdi tað møguligt hjá fiskiskipum at selja fiskin á einum opnum marknaði, har øll virkir í landinum og umboðsmenn hjá útlendskum keyparum frítt kunnu kappast um fiskin. Sostatt varð eisini latið upp fyri, at mynstrið við føstum tilknýti millum virkir og skip kundi broytast – og varð hetta mynstrið eisini broytt í eftirfylgjandi árum.

Eingi veiðuhagtøl eru tøk, sum vísa í hvønn mun djúpvatnstrolarar selja beinleiðis til virkir, umvegis fiskamarknaðin ella til útlendskar keyparar. Hagtøl eru tó tøk fyri allar lemmatrolarar, tvs. djúpvatnstrolarar og trolbátar á landleiðini. Hesi geva eina greiða ábending um, at í árunum eftir 1993 er ein vaksandi partur av veiðini hjá hesum báðum skipabólkum undir einum avreiddur antin umvegis fiskamarknaðin ella til útlendskar keyparar. Tað er trupult at siga, í hvønn mun djúpvatnstrolararnir árini frá miðskeiðis í 1990unum og fram til 2003/2004 hava avreitt aðrastaðni enn í Suðuroynni, men nevnda mynstrið hevur helst eisini í ávísan mun verið galdandi fyri djúpvatnstrolararnar.

Seinastu 1-2 árini er so aftur ein broyting farin fram, soleiðis at skip og virkir aftur eru farin at arbeiða tættari saman. Í nøkrum førum er talan um, at virkir hava keypt skip. Hetta hevur verið galdandi fyri Delta Seafood á Tvøroyri og fyri Norðís á Eiði, Kósina í Klaksvík, fyri at nevna nøkur dømi. Eisini eru dømi um, at skip hava gjørt íløgur í virkir. Økta samstarvið millum virkir og skip er ivaleyst ein staðfesting av, at samstarv á hesum økinum er neyðug fyri at skapa ein ávísan tryggleika fyri báðar partar, virkir og fiskiskipini. Virkið fær størri rávørutrygd, ið jú er sera umráðandi at hava yvir fyri keyparunum. Harumframt fær virkið kontinuitet í raksturin, soleiðis at raksturin kann skipast betri og gerast lønsamari. Betri lønsemi í rakstrinum gevur so aftur møguleika fyri at geva betri prís til skipini.

*Aftur tættari tilknýti millum djúpvatnstrolarar og fiska- og flakavirkir í Suðuroynni*

Hendan gongdin hevur eisini víst seg í Suðuroynni. Djúpvatnstrolarar í Hvalba hava saman við Delta Seafood á Tvøroyri gjørt íløgur í fiskavirkið í Hvalba – og er sostatt skapt tætt samstarv millum partarnar. Umframt hetta samstarvið, so tykist eisini vera samstarv millum djúpvatnstrolarar á Tvøroyri og Føroya Fiskavirking á Tvøroyri, eins

og samstarv tykist vera millum Føroya Fiskavirking í Vági og teir báðir djúpvatnstrolararnir í Vági (Føroya Fiskavirking hevur flakavirkini á Tvøroyri og í Vági). Djúpvatnstrolararnir á Tvøroyri landa saman við Bresta mest sum altíð á Tvøroyri, uttan so at teir royna eftir stinglaksi; tá landað teir uttanlands (Rasmus Effersøe landar t.d. nógv uttanlands, tí hann einamest roynir eftir stinglaksi). Í Vági hava Roc Amadour og Sancy í eitt samanhangandi longri tíðarskeið landað í Vági, antin beinleiðis til flakavirkið hjá Føroya Fiskavirking ella á Fiskamarknaðinum í Vági.

Um hugt verður at veiðuhagtølinum fyri fyrsta ársfjórðing í 2006, so eru eisini her tekin um, at mynstrið er broytt. Um hugt verður eftir partinum hjá føroyskum fiskakeyparum, so avreiddu lemmatrolararnir (bæði djúpvatnstrolarar og trolbátar á landleiðini) fyrsta ársfjórðing 2006 65% av veiðuni beinleiðis til føroyskar fiskakeyparar. Sama ársfjórðing í 2005 var talið 44% - altso ein vøkstur uppá umleið 20% fyrsta ársfjórðing 2006 í mun til 2005. Meginorsøkin til vøksturin er, at minni av veiðuni varð avreitt til útlendskar fiskakeyparar. Fyrsta ársfjórðing í 2005 avreiddu lemmatrolararnir 44% til útlendskar fiskakeyparar, meðan talan bert var um 14% fyrsta ársfjórðing í 2006. Nøgdin, sum varð avreidd til uppboðssøluna, var eitt vet størri fyrsta ársfjórðing í 2006 enn fyrsta ársfjórðing í 2005. Fyrsta ársfjórðing 2006 avreiddu lemmatrolarnarir 21% av veiðuni til uppboðssøluna, meðan hetta talið í 2005 var 13% (kelda: www.hagstova.fo).

*Støðugari rávøruveiting, meiri virksemi*

Broytta mynstrið hevur skapt eina støðugari veiting av rávøru í Suðuroynni, og hevur hetta sjálvsagt eisini ávirkan á, hvussu støðugt arbeiði er. Hóast fleiri av virkjunum eisini keypa fisk ígjøgnum fiskamarknaðin og frá øðrum skipum, so hevur rávøran frá djúpvatnstrolarunum heilt stóran týdning fyri virksemi á flaka- og fiskavirkjunum í oynni, ikki minst tí virksemi á virkjunum í ávísan mun er tillaga fiskasløgunum, sum djúpvatnstrolararnir fiska.

Framleiðsluorkan í Suðuroynni er í dag umleið 35.000 tons[6], men skal tað tó staðfestast, at framleiðsluorkan ikki hevur verið so stór sum hetta tey seinastu árini – t.d. var í januar í 2005 onki virksemi á fiskavirkinum Kirvið í Lopra, á Palm Seafood og Løðhamar í Vági og á fiskavirkinum í Hvalba. Í dag er støðan ein onnur. Eftir nógv ár við skiftandi virksemi, hevur seinastu mánaðirnar verið meiri støðugt virksemi á fleiri flaka- og fiskavirkjum í oynni. Tilsamans eru 7 flaka- og fiskavirkir í gongd í Suðuroynni í løtuni. Í Vági er virksemi á flakavirkinum hjá Føroya Fiskavirking, á Løðhamar (serliga saltfiska framleiðsla), JMA Seafood (saltfiska framleiðsla) og fyri einari tíð síðani fór virksemi eisini í gongd á Palm Seafood, har teir m.a. turka fisk. Á Tvøroyri er virksemi á flakavirkinum hjá Føroya Fiskavirking og á Delta Seafood, umframt at onkur smærri framleiðari eisini er, sum framleiðir til heimamarknaðin. Í Hvalba er aftur virksemi á fiskavirkinum, eftir at tað lat upp í september í 2005. Og fyrst í apríl 2006 byrjaði eisini framleiðsla á fiskavirkinum Kirvið í Lopra, eftir at tað hevur ligið stilt í nøkur ár.

Økta virksemi á flaka- og fiskavirkjunum í oynni merkir eisini, at tørvur er á øktum rávørugrundarlagi, og viðførir hetta sostatt eisini, at tey fiskiskipini, sum eru í oynni, fáa alsamt størri týdning fyri fiskivinnuna á landi – og her eru djúpvatnstrolararnir av avgerandi týdningi.

*Kanning millum flaka- og fiskavirkir í apríl 2006*[7]

Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi í apríl 2006 eina kanning millum flaka- og fiskavirkini í oynni fyri á tann hátt at lýsa týdningin, sum djúpvatnstrolararnir hava fyri virkini. Sum nevnt hevur virksemi á flaka- og fiskavirkjunum í Suðuroynni verið óstøðugt seinastu árini og var tað m.a. lítið virksemi á virkjunum fyrsta ársfjórðing í 2005. Hetta er nú broytt og hava tey 7 virkini, sum eru í gongd, tilsamans framleitt sløk 7.000 tons fyrsta ársfjórðing 2006 (Spurnarblaðskanning, apríl 2006).

---

[6] Hvalba 5.000 tons, Delta Seafood 5.000 tons, Føroya Fiskavirking á Tvøroyri 10.000 tons, Føroya Fiskavirking í Vági 10.000 tons, Palm Seafood 2.500 tons, Løðhamar 1.500 tons, JMA Seafood 500 tons, Kirvi í Lopra 1.500 tons.

[7] Granskingardepilin fyri Økismenning sendi í apríl 2006 spurnarblað til øll flaka- og fiskavirkir í Suðuroynni, hesi eru fiskavirki í Hvalba, Delta Seafood á Tvøroyri, Føroya Fiskavirking á Tvøroyri, Føroya Fiskavirking í Vági, Palm Seafood í Vági, Løðhamar í Vági, JMA í Vági, og Kirvi í Lopra. Av hesum hava øll svarað spurnarblaðnum uttan Kirvið í Lopra.

Av hesum 7.000 tonsunum eru góð 4.200 tons keypt frá djúpvatnstrolarunum – við øðrum orðum stavaði 60% av rávøruni, sum flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni tóku ímóti fyrsta ársfjórðing í 2006, frá djúpvatnstrolarunum. Fiskavirkið í Hvalba og Delta Seafood á Tvøroyri keypa millum 85% og 95% av av síni rávøru frá djúpvatnstrolarunum. Føroya Fiskavirking í Vági hevur 1. ársfjórðing keypt meiri enn 2/3 av síni rávøru beinleiðis frá djúpvatnstrolarunum, meðan Føroya Fiskavirking á Tvøroyri sama tíðarskeið hevur keypt gott og væl helvtina av síni rávøru frá djúpvatnstrolarunum.

Fyrsta ársfjórðing í ár rindaðu flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni tilsamans umleið 14 mio. kr. í lønum, og vóru í miðal umleið 310 fólk til arbeiðis á teimum flaka- og fiskavirkjunum, sum luttóku í kanningini. Flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni eru týdningarmikil arbeiðspláss. Talan er serliga um ófaklærd arbeiðsfólk. Í Suðuroynni eru flaka- og fiskavirkini millum teir fáu valmøguleikarnir, ófaklærd fólk hava, tá umræður arbeiði. Hetta er ikki minst galdandi fyri ófaklærdar kvinnur.

Ilt er at meta um, hvussu støðugt virksemi verður á flaka- og fiskavirkjunum í Suðuroynni komandi mánaðir, men út frá metingum hjá virkisleiðarum, so koma flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni væntandi at taka ímóti eini 26.000-27.000 tonsum av fiski í ár. Hetta er væl meiri enn í 2005, tá flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni einans tóku ímóti tilsamans gott og væl 15.000 tonsum av fiski. Um hetta fer at halda, verður arbeiði á flaka- og fiskavirkjunum í Suðuroynni eisini væl støðugari í 2006 enn í árunum frammanundan. Við útgangsstøði í fyrsta ársfjórðingi 2006 eru sostatt ábendingar um, at virksemið verið væl størri í 2006 enn í 2005. Til dømis rindaðu flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni umleið 39 mio. kr. í lønum í 2005, meðan flaka- og fiskavirkini, sum eru við í kanningini, rindað umleið 14 mio. kr. í lønum fyrsta ársfjórðing 2006. Men ein týdningarmikil fortreyt fyri framhaldandi støðugum virksemi er rávøran, og fyri flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni hevur rávøran frá djúpvatnstrolarunum alstóran týdning.

### Týdningurin fyri tænastuvinnuna í Suðuroynni

Í Suðuroynni eru tað fleiri fyritøkur, sum veita tænastur til djúpvatnstrolararnir. Djúpvatnstrolararnir hava ein miðalaldur á 25 til 30 ár og førir hetta við sær, at skipini áhaldandi krevja ábøtur. Hetta merkir eisini virksemið á fleiri maskinverkstaðum á Tvøroyri og í Vági, við tað at hesir maskinverkstaðir veita tænastur til djúpvatnstrolararnir. Nógvar av stórum umvælingunum verða gjørdar á Tórshavnar Skipasmiðju, meðan tær smærri og meiri regluligu ábøturnar og umvælingarnar oftast verða gjørdar av fyritøkum í Suðuroynni.

**Bærendsen Teknik: Djúpvatnstrolarar avgerandi týdning fyri okkum**
Bærendsen Teknik á Tvøroyri er ein fyritøka, sum hevur maskinsmiðju, elverkstað og eisini ein el-handil. Bergur Bærendsen, stjóri, vísir á, at djúpvatnstrolarar hava havt avgerandi týdning fyri virksemið á maskinsmiðjuni hjá Bærendsen Teknik. Av tilsamans 12-13 starvsfólkum í fyritøkuni, eru 6 fólk beinleiðis knýtt at tænastuveiting til djúpvatnstrolararnir, sigur Bergur Bærendsen, stjóri á Bærendsen Teknik.

Umframt maskinverkstaðir eru eisini tvær fyritøkur í Suðuroynni, sum framleiða reiðskap til djúpvatnstrolararnir. Trolvirkið Bergið í Hvalba hevur serliga lagt seg eftir at gera trol o.a. til djúpvatnstrolararnir, og er ein heilt stórur partur av virkseminum hjá Berginum knýtt at djúpvatnstrolarunum. Fyritøkan Rock í Vági framleiðir trollemmar og veitir tænastur í hesum sambandi, og eru nakrir av djúpvatnstrolarunum eisini kundar hjá Rock.

**Tangavirkið í Vági**
Tangavirkið í Vági er ein maskinverkstaður, sum umframt at gera tangar eisini veitir tænastur til skip og ger eisini fabrikkir til fiskiskip. Tangavirkið hevur seinastu árini verið veitari av tænastum til djúpvatnstrolararnir Roc Amadour og Sancy, og Arni Brattaberg á skrivstovuni hjá Tangavirkinum sigur, at teir báðir djúpvatnstrolararnir hava stóran týdning fyri virksemið á Tangavirkinum. Eisini vísir hann á, at Tangavirkið í løtuni umvælir og broytir fabrikkina til Rankan á Tvøroyri, umframt at Tangavirkið fyri nøkrum árum síðani gjørdi nýggja fabrikk umborð á Sancy.

Umframt tænastuveitarar við heimstaði í Suðuroynni eru eisini aðrir tænastuveitarar, sum hava tilknýti til djúpvatnstrolararnir, ið skapa ávíst virksemi í Suðuroynni. Nevnast kunnu oljufeløgini og leverandørar av provianti. Hóast oljufeløgini og teir stóru leverandørarnir av provianti hava høvuðssætið í Tórshavn, so eru tað fleiri fólk í

Suðuroynni, sum eru knýtt at veitingunum av hesum vørum og tænastum. Nakrir av djúpvatnstrolarunum keypa eisini proviant frá lokalum fyritøkum.

Sum heild kann sigast, at djúpvatnstrolararnir hava stóran týdning fyri virksemi á avleiddum vinnum í oynni, tvs. at inntøkurnar hjá fleiri fólkum í oynni, bæði innan fiskavøruídnaðin (flaka- og fiskavirkini) og innan tænastuvinnurnar, eru beinleiðis tengdar at djúpvatnstrolarunum.

### *Djúpvatnstrolararnir menningarmøguleiki í øðrum høpi eisini*

Umframt at hava bæði beinleiðis og óbeinleiðis týdning fyri virksemið í oynni hava djúpvatnstrolararnir havt og kunnu teir eisini koma at hava ein annan týdningarmiklan leiklut fyri Suðuroynna. Djúpvatnstrolararnir teljast millum tær stóru fyritøkurnar í Suðuroynni og eru sostatt eisini av týdningi fyri heildina, hvat vinnulívinum í oynni viðvíkur.

Menningarmøguleikin í slíkum fyritøkum er stórur. Hetta er PF Steintór í Hvalba, sum telist millum best riknu djúpvatnstrolararnar í landinum, eitt dømi um. Í tíðarskeiðinum frá 1993 til 2005 hevur PF Steintór meiri enn 10 falda eginognina (www.business-line.fo). PF Steintór eigur djúpvatnstrolaran Steintór, men hevur tey seinastu árini harumframt verið við til at ment og styrkt vinnulívið í Hvalba. Umframt djúpvatnstrolaran Steintór eigur PF Steintór dótturfelagið PF Sjagaklettur, sum í 2003 keypti djúpvatnstrolaran Sjagaklettur. Somuleiðis hevur PF Steintór eisini í fleiri umførum sett pengar í fiskavirkið í Hvalba, og pening í felagið, sum í næstum fer undir toskaaling í Hvalba, umframt at felagið hevur sett pengar í aðrar fyritøkur í oynni.

PF Steintór er eitt gott dømi um, hvønn týdning tað hevur fyri eitt øki at hava væl riknar og fíggjarliga sterkar fyritøkur. Slíkar fyritøkur kunnu virka við til, at aðrar fyritøkur og ikki minst aðrar vinnur kunnu verða settar á stovn í økinum – ella bjargaðar, um/tá tørvur er á tí. Ein uppgerð, sum Suðuroyar Sparikassi gjørdi í 2004, vísti, at ein av trupulleikunum hjá vinnulívinum í sunnaru helvt av Suðuroy í 2002 og 2003 var, at úrslitini vóru ov vánalig og skuldin ov stór í mun til eginpeningin (*Kelda:* Suðuroyar

Sparikassi). Ein slík støða hevur ávirkan á í hvønn mun tað er gjørligt at savna váðafúsan kapital til stovnan av nýggjum fyritøkum, keyp av fyritøkum ella tá verandi fyritøkur tørva nýggja kapitalinnspræning. Í so máta kunnu feløg sum PF Steintór hava stóran týdning fyri oynna í síni heild, tí hesi feløg eru við til at vinna pening til økið og kunnu tá gerast eitt potientali í smb. við menning ella stovnan av nýggjum fyritøkum ella nýggjum vinnum.

## 2. Høgu oljuprísirnir og djúpvatnstrolararnir

Seinastu tíðina eru oljuprísirnir hækkaðir munandi, um samanborið verður við oljuprísirnar fyri bara fáum árum síðani. Oljuprísurin í dag (apríl 2006) er umleið dupult so høgur sum oljuprísurin í t.d. 2002, men leggjast skal afturat, at príshækkingin er serliga farin fram í 2005 og 2006. Sum støðan er nú, har framleiðslan og harvið útboðið av olju er ov lítið í mun til eftirspurningin, so er mest sannlíkt, at oljuprísurin fer at halda seg á einum sera høgum støði – og kanska enntá hækka upp aftur meiri.

Sum nevnt eru tað 12 djúpvatnstrolarar í landinum, og skilt verður stórar og smáar djúpvatnstrolarar. 8 eru stórir, meðan 4 eru smáir. Teir stóru djúpvatnstrolararnir brúka uml. 1,7 mio. litrar av olju hvør um árið, meðan teir minnu djúpvatnstrolararnir árliga brúka uml. 1,3 mio. litrar av olju hvør . Hetta merkir, at samlaða oljunýtslan hjá hesum skipabólkinum er uml. 18-19 mio litrar um árið - í miðal uml. 1,6 mio. litrar pr. skip.

Oljuprísirnar hava seinasta árið verið vaksandi, bæði fyri húsarhald, vinnulívið og fyri fiskiflotan. Men fyri fiskiflotan eru oljuprísirnar øðrvísi samansettir enn fyri húsarhald og vinnulívið. Oljuprísurin hjá fiskiflotanum verður vanliga nevndur *Listaprísurin*. Fiskiflotin rindar ikki MVG og oljuavgjald av oljuni; tí er kostnaðurin pr. litur olju bíligari fyri fiskiflotan enn fyri t.d. húsarhald. Afturat hesum kemur eisini, at nógv reiðarí hava samrátt seg fram til ein ávísan avsláttur pr. litur. Fyri djúpvatnstrolararnir er hesin avsláttur áleið 45 oyri pr. litur. Í talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir miðal oljuprísin hjá fiskiskipum í tíðarskeiðinum frá 2001 til 2006. Í talvuni er eisini eitt yvirlit yvir, hvussu nógv djúpvatnstrolararnir veruliga rinda pr. litur olju. Hetta er sjálvsagt áhugavert, tí hetta gevur eina mynd av, hvør veruligi kostnaðurin hjá djúpvatnstrolarunum er.

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Listaprísurin[8] í miðal pr. litur | 3,08 kr. | 2,12 kr. | 2,27 kr. | 2,57 kr. | 3,41 kr. | 3,75 kr. |
| Oljuprísir fyri djúpvatnstrolarar** | 2,63 kr. | 1,68 kr. | 1,82 kr. | 2,12 kr. | 2,96 kr. | 3,30 kr. |

**Talva 2. Oljuprísir í miðal pr. litur (Kelda: Føroya Shell)**

* Prísirnir eru fyri tíðarskeiðið fram til apríl 2006.
** Djúpvatnstrolararnir fáa í miðal umleið 45 oyri í avsláttri pr. litur.

## *Ávirkan á raksturin*

Hjá djúpvatnstrolarunum er oljunýtslan vanliga ein sera tyngjandi rakstrarútreiðsla, og tískil hevur ein hækking av oljuprísinum eisini sera stóra ávirkan á raksturin hjá djúpvatnstrolarunum. Um hugt verður at samlaðu oljunýtsluni hjá djúpvatnstrolarunum, sum er uppá 18-19 mio. litrar um árið, so vil ein hækking uppá eina króna merkja eina samlaða meirútreiðslu fyri henda skipabólkin uppá 18-19 mio. krónur. Ein hækking uppá 1,50 krónur merkir eina meirútreiðslu uppá 27-29 mio. krónur og so framvegis.

Um hugt verður eftir rakstrarúrslitunum hjá djúpvatnstrolarunum áðrenn avskrivingar og rentur[9] í árunum 2001 til 2004, so sæst, at avlopið veksur í tíðarskeiðinum frá 2001 til 2002, minkar eitt vet í 2003 fyri síðani at minka munandi (við meiri enn 50%) frá 2003 til 2004 (sí eisini Talvu 3. niðanfyri). Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2004 hækkar oljuprísurin við 30 oyrum í miðal, og er hetta uttan iva ein av orsøkunum til, at úrslitið versnar frá 2003 til 2004.

Um teir høgu oljuprísirnir, sum nú eru, verða settir í mun til miðal úrslitini í árunum 2001 – 2004, so gerst ávirkanin á raksturin hjá djúpvatnstrolarunum eisini sjónlig. Í talvuni niðanfyri eru rakstrarúrslit fyri djúpvatnstrolararnir, oljunýtslan og kostnaður, umframt at ein útrokning er yvir, hvussu úrslitið í árunum 2001-2004 hevði verið, um oljuprísirnir tá vóru á sama støði, sum teir í miðal vóru 1. ársfjórðing 2006, tá miðalprísurin var 3,30 kr. pr. litur.

---

[8] Listaprísurin er tann prísurin, sum fiskiflotin rindar fyri oljuna.
[9] Orsøkin til, at úrslit áðrenn avskrivingar og rentur er áhugavert, er, at tað gevur eina greiðari mynd av, hvussu úrslitið av sjálvum rakstrinum hjá skipunum var. Avskrivingar og rentur – tvs. kapital kostnaðurin – er ymiskur frá einum skipið til annað, tí verða hesir postar ikki tiknir við, hóast hesir postar eru við, tá ársúrslitið av rakstrinum hjá skipunum verður gjørt upp.

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Tal av skipum | 11 | 11 | 13 | 13 |
| Veiðunøgd fyri bólkin (tons) | 18.765 | 23.134 | 20.228 | 19.470 |
| **Rakstrarúrslit (áðrenn avskrivingar og rentur)** | | | | |
| Samlað úrslit áðrenn avskr. og rentur (1.000 kr.) | 22.039 | 29.637 | 30.462 | 14.755 |
| Miðalúrslit pr. skip áðrenn avskr. og rent. * (1.000 kr.) | 2.004 | 2.697 | 2.343 | 1.135 |
| **Oljunýtslan og kostnaður** | | | | |
| Miðal oljunýtsla pr. skip um árið (1.000 l.) | 1.600 | 1.600 | 1.600 | 1.600 |
| Miðal oljuprísur kr. pr. litur | 2,68 | 1,73 | 1,87 | 2,17 |
| Miðal útreiðsla til olju um árið (1.000 kr.) | 4.288 | 2.768 | 2.992 | 3.472 |
| **Meirútreiðsla av olju, í mun til miðalprísin 1. ársfjórðing í 2006 (3,30 kr. pr. litur)** | | | | |
| Meir útreiðsla til olju - prísur apríl 2006** (1.000 kr.) | 1.072 | 2.592 | 2.368 | 1.888 |
| Alternativt miðalúrslit áðrenn avskr. og rent. (1.000 kr.) | 932 | 102 | -25 | -753 |

**Talva 3. Rakstrartøl fyri djúpvatnstrolararnir**
*Keldur: Fiskiveiðieftirlitið, Rasmussen og Weihe (2004), Føroya Shell*

* Miðalúrslitið er roknað út frá tí samlaða úrslitinum í mun til tal av skipum tað einstaka árið
** Meirútreiðslan er roknað útfrá, at oljuprísurin árini 2001-2004 var á sama støði sum 1. ársfjórðingi í 2006, tá miðal oljuprísurin 3,30 kr. pr. litur.

Tá tann høgi kostnaðurin á olju, sum 1. ársfjórðing í 2006 í miðal var 3,30 kr. pr. litur, verður roknaður inn í raksturin fyri árini 2001 – 2004, gerst greitt, at tað hevur stóra ávirkan á raksturin. Úrslitið fyri 2001 hevði minkað við einari helvt (sí Talvu 3. omanfyri). Úrslitini fyri 2002 og 2003 høvdu ligið um nullpunktið, meðan úrslitið í 2004 hevði verið eitt munandi hall, tvs. at skipini rakstrarliga ikki høvdu nakað avlop til avskrivingar og rentur. Hetta merkir so eisini, at fyri tey flestu skipini hevði ársúrslitið, eftir avskrivingar og rentur og áðrenn óvanligir postar og skatt, verið eitt stórt hall. Og við framhaldandi høgum oljuprísum tað sum eftir er av hesum árinum – og tá tað enntá er væntandi, at oljuprísurin hækkar enn meiri móti ársenda (ÚF, 2. mai 2006), so eru ikki góð útlit fyri raksturin hjá djúpvatnstrolarunum fyri árið 2006.

### *Krøv til nøgd og prísir, um oljuprísurin verður 4,00 kr. pr. litur*

Ein áhugaverdur spurningur, sum fólk í og um vinnuna helst seta sær sjálvum í hesum tíðum – við høgum og hækkandi oljuprísum – er, hvar markið gongur fyri, nær tað ikki er lønandi hjá djúpvatnstrolarunum at fara til fiskiskap.

Eitt vanligt ár ger ein djúpvatnstrolari í miðal 22 túrar. Neyðugar rakstrarútreiðslur fyri ein vanligan túr kunnu setast upp sum víst niðanfyri.

| **Vanligar rakstrarútreiðslur pr. túr** | |
|---|---|
| Fyrisiting, revisjón o.a. | 5.000 kr. |
| Samskifti | 5.000 kr. |
| Tryggingar | 15.000 kr. |
| Viðlíkahald | 50.000 kr. |
| Proviantur | 15.000 kr. |
| Reiðskapur | 50.000 kr. |
| Landing, ísur, havnagjøld v.m. | 40.000 kr. |
| **Tilsamans** | 180.000 kr. |

**Talva 4. Vanligar rakstrarútreiðslur pr. túr**

Afturat útreiðslunum í Talvu 4. koma eisini útreiðslur til olju (brenniolju og smyrjiolju). Ein djúpvatnstrolari bunkrar umleið 72.000 litrar av brenniolju og afturat hesum smyrjiolju fyri uml. 15.000 kr. til ein vanligan túr. Um netto-oljuprísurin (tvs. har 45 oyru eru roknaði í avsláttri) hækkar uppí 4,00 kr. pr. litur – sum smbr. serkønum er væntandi (ÚF, 3. mai 2006) – so merkir tað, at oljuútreiðslurnar (brenniolja og smyrjiolja) tilsamans verða umleið 300.000 kr. pr. túr. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar verða í slíkum føri tilsamans 480.000 kr. pr. túr.

Sambært roknskapargreiningini hjá Rasmussen og Weihe er hýruparturin pr. túr í miðal umleið 40% (Rasmussen og Weihe, 2004), og merkir hetta sostatt, at ein djúpvatnstrolari ein vanligan túr skal fiska fyri í minsta lagi 800.000 kr. fyri at dekka sjálvan rakstrarkostnaðin. Og tá eru avskrivingar og rentur ikki tiknar við .

Sambært roknskapartølunum frá Business-Line fyri partafeløg, ið reka djúpvatnstrolarar, so hava feløgini í miðal uml. 1.000.000 kr. í avskrivingum og í miðal uml. 500.000 kr. í rentum (www.business-line.fo). Verður hetta býtt út á 22 túrar, so verður talan um avskrivingar uppá 45.000 kr. og rentur uppá 23.000 kr. pr. túr.

Við avskrivingum og rentum eru rakstrarútreiðslurnar pr. túr hjá einum djúpvatnstrolara sostatt tilsamans umleið 548.000 kr. Av tí at hýruparturin í miðal er uml. 40%, so fevna rakstrarútreiðslurnar íroknað avskrivingar og rentur sostatt um 60%. Hetta merkir, at ein djúpvatnstrolari í miðal skal selja fyri 913.000 kr. pr. túr fyri at svara hvørjum sítt – hetta um oljuprísurin er 4,00 kr. pr. litur. – Og tá er onki eftir til forrentan av eginpeningi og konsolidering av felagnum.

Undanfarnu 4-5 árini hava djúpvatnstrolararnir tilsamans fiskað umleið 20.000 tons um árið, ella umleið 1.700 tons í miðal pr. skip. Býtt á 22 túrar er talan um, at hvør túrur í miðal er á 77,25 tons. Miðalprísurin hevur í undanfarnu 4-5 árini ligið um 10,00 kr. pr. kg., men var miðalprísurin tó helst nakað lægri enn hetta í 2005. Um ein vanligur túrur á í miðal 77,25 tons skal svara hvørjum sítt – tvs. 913.000 kr. – so er kravið ein miðalprísur á umleið 11,80 kr. – hetta um oljuprísurin er 4,00 kr. pr. litur. Fyri at svara hvørjum sítt við einum miðalprísi á 10,00 kr. pr. kg skal veiðunøgdin í miðal pr. túr økjast til 91 tons).

## 3. Tillagingar – hvørjir møguleikar eru?

Eitt av lyklahugtøkunum í smb. við tær avbjóðingar, sum vinnulívið á einhvønn hátt stendur ella og kann koma at standa yvirfyri, er hugtakið *tillaging*. Greitt er, at verandi oljuprísir krevja rakstrarliga eina munandi tillaging hjá djúpvatnstrolarunum, men hvørjir møguleikar eru fyri tillaging í smb. við høga oljuprísin?

Skiljast kann millum tillagingar á útreiðslusíðuni og tillagingar á inntøkusíðuni. Hvat útreiðslusíðuni viðvíkur, so kann tað gerast trupult at gera tillagingar har. Fleiri av útreiðslupostunum eru lógar- ella sáttmálabundnir, meðan aðrir eru alneyðugir fyri sjálvan raksturin av skipunum. Hetta er til dømis galdandi fyri reiðskap, proviant, ís og so framvegis.

### *Veiðunøgd og prísir*

Inntøkusíðan er samansett av veiðunøgd og avreiðingarprísi. Samlaða veiðan hjá djúpvatnstrolarunum hevur í árunum frá 2001 til 2005 støðugt ligið um 20.000 tons um árið (Fiskiveiðieftirlitið – www.fse.fo). Miðalprísurin í tíðarskeiðinum frá 2001 – 2004 lá um 10,00 kr. pr. kg. (Rasmussen og Weihe, 2004) og miðalprísurin í 2005 var eitt sindur lægri enn í 2004 (sambært reiðaríum, ið ynskja at verða ónevnd). Um hugt verður eftir, hvørji fiskasløg eru fiskaði í 2005 í mun til í 2004, so er munandi minni nøgdir av teimum dýrari fiskasløgunum (kongafiskur, svartkalvur og stinglaksur), meðan nógv meiri varð fiskað av upsa, sum gevur lægri prís. Hetta viðførir ein lægri miðalprís.

Ein tillaging og øking av inntøkunum kann sostatt gerast við at økja um veiðunøgdina, við at avreiðingarprísurin hækkar ella ein samanrenning av báðum. Við verandi veiðurættindum er tað trupult at økja um veiðunøgdirnar. Djúpvatnstrolararnir hava í stóran mun bert loyvi at royna undir Føroyum. – Og undir Føroyum eru rættindini hjá hesum skipabólkinum minkaði seinastu árini, við tað at hjáveiðukvoturnar eftir toski og hýsu politiskt eru skerdar. Djúpvatnstrolararnir hava mest sum ongi rættindi í

fremmandum sjóøki. Tey rættindi, ið djúpvatnstrolararnir hóast alt hava[10], geva bert møguleikan hjá 2-3 skipum at gera 2-3 túrar í part um árið.

Størsti møguleikin fyri at økja um veiðurættindini hjá djúpvatnstrolarunum má sigast at liggja í fremmandum sjóøki, og hava djúpvatnstrolararnir fyrr eisini fiskað bæði undir Íslandi, í Barentshavinum og í Irmingarhavinum. Í Irmingarhavinum vóru tað upprunaliga djúpvatnstrolararnir sum vunnu Føroyum søgulig rættindi. Í dag hava djúpvatnstrolararnir ongi rættindi at fiska í Irmingarhavinum. Tað liggur sostatt ein ávís politisk avbjóðing í aftur at vinna djúpvatnstrolarunum fiskirættindi í fremmandum øki. Hetta vildi stuðla undir einari neyðugari tillaging, nú oljuprísurin er og ivaleyst verður verandi sera høgur.

### *Produktmix*[11]

Ein øking av inntøkunum yvir prísin er møgulig, um prísurin á hvørjum einstøkum fiskaslagi hækkar og/ella at produktmixið, tvs. samansetingin av veiddu fiskasløgum, broytist. Príshækkingin av hvørjum fiskaslagi sær er í stóran mun tengd at prísum á fiskavørum á teimum marknaðum, ið selt verður til. Skipini hava sostatt sera lítla ávirkan á prísin. Tó vil eitt hægri góðskustøði í mun til meðal, alt annað líka, geva ein hægri prís.

Hvat viðvíkur produktmixinum er støðan ivaleyst tann, at hvørt skipið roynir at fiska eina veiðusamanseting, soleiðis at hvør túrurin hevur so stórt avreiðingarvirði sum gjørligt. Hetta er ein “kunstur” í sær sjálvum, tí ongin fiskidagur er eins, hvat nøgd ella fiskaslagi viðvíkur. Oftast er tó tað mynstri at síggja, at roynt verður eftir eini størri nøgd av upsa, ið er eitt fiskaslag, sum hevur lágan prís, ella verður roynt eftir dýrari fiskasløgum, har nøgdin er minni, t.d. eftir toski vesturi við Íslandsmarkið ella eftir kongafiski vestur úr Mykinesi. Orsøkin til hetta mynstur er, at hvør túrurin er 10-12

---

[10] Hugsað verður her um tey sera avmarkaðu rættindi til at fiska eftir svartkalva og kongafisk í Eystur-Grønlandi. Skerdu nøgdirnar geva bert møguleika hjá 1-2 skipum at fara 1-2 túrar. Djúpvatnstrolararnir Niels Pauli og Brestir hava hesar kvoturnar burturav. Umframt hesa kvotu í Eystur-Grønlandi er eisini ein upsa-kvota í Norðsjónum, sum vanliga verður brúkt sum hjáveiðu-kvota hjá ídnaðarskipunum – einstøk ár hava einstakir djúpvatnstrolarar fingið bjóðað partar av hesari kvotuni.

[11] Samansetingin av veiddum fiskasløgum.

dagar. Roynt verður tískil at avmarka siglingina millum fiskileiðirnar; tíðin verður brúkt til fiskiskap heldur enn til sigling.

Royndir og dugnaskapur eru sjálvsagt lyklaorðini í samband við optimalt produktmix, men politiski niðurskurðurin í hjáveiðukvotuni av toski og hýsu seinastu árini hevur eisini eina greiða ávirkan á møguleikarnar, hvat produktmixi viðvíkur.

Samanumtikið er tað ein stór avbjóðing hjá djúpvatnstrolarunum at tillaga seg til tær stóru broytingar í fortreytunum, sum høgu oljuprísirnar hava viðført. Møguleikarnir hjá djúpvatnstrolaraflotanum at gera tillagingar eru tó avmarkaðir, og eigur man helst eisini at fylgja gongdini frá politiskari síðu.

## 4. Suðuroyggin sum feskfiskadepil?

Í januar mánaða í 2005 kom Føroya Landsstýri fram við eini Suðuroyarætlan í smb. við, at støðan í Suðuroynni tá var sera ring, eftir at fleiri fiska- og flakavirkir høvdu snarað lykilin og lógu still ella høvdu ligið still í eitt tíðarskeið. Í punkt 1. í Suðuroyarætlanini vísir Føroya Landsstýri á møguleikan fyri, at Suðuroyggin verður ein feskfiskadepil, eins og hon var tað fyrst í 1990unum (www.tinganes.fo).

Produktmixið umborð á djúpvatnstrolarunum, tvs. veiðan, sum djúpvatnstrolararnir fiskað, er væl egnað til eina framleiðslu, har lidna vøran verður seld til feskfiskamarknaðin. Framleiðslan á landi í Suðuroynni er eisini í stóran mun "geara" til framleiðslu til feskfiskamarknaðin á evropeiska meginlandinum, umframt at framleiðsluorkan í oynni eisini er nóg stór.

Í mun til marknaðin fyri serliga frystum fiskaúrdráttum, so er feskfiskamarknaðurin tann marknaðurin, sum er til reiðar at gjalda tann hægsta prísin pr. kg. Ein høgur søluprísur til marknaðin á evropeiska meginlandinum ger tað eisini møguligt hjá framleiðsluvinnuni á landi at gjalda ein hægri prís fyri fiskin frá fiskiskipinum, í hesum førunum frá djúpvatnstrolarunum, ið hava tilknýti til Suðuroynna.

### *Avskipingarmøguleikarnir ein forðing*

Møguleikarnir fyri, at Suðuroyggin kann gerast ein feskfiskadepil eru tó, sum er, munandi skerdir orsaka av teimum vánaligu avskipingarmøguleikunum, sum framleiðsluvinnan í Suðuroynni hevur til útheimin. Avskipingarmøguleikarnir fyri feskar fiskavørur úr Suðuroynni eru hesir:

**Mánakvøld av Runavík**

Mánakvøld siglir Skipafelagið av Runavík til Scrabster í Skotlandi. Orsaka av avmarkaðari framleiðslutíð og fjarstøðuni til avskipingarstaðin í Runavík, verður henda leiðin næstan ongantíð brúkt av feskfiskavinnuni í Suðuroynni.

**Tórskvøld av Tórshavn**

Tórskvøld siglir Norrøna av Tórshavn til Hanstholm í Danmark. Henda leiðin er tann, ið verður nógv mest nýtt av feskfiskavinnuni sum heild, eisini feskfiskavinnuni í Suðuroynni. Norrøna er í Hanstholm fyrrapartin leygardag, og merkir hetta, at vøran kann vera frammi hjá kundum í Tysklandi, Fraklandi, Benelux londunum v.m. til sølu mánamorgun, og er hetta eisini tað, kundarnir ynskja.

Í vetrarhálvárinum siglir Norrøna av Havnini tórsdag kl. 17.00, og í hesum sambandi siglir Smyril av Tvøroyri kl. 14.00. Fyri feskfiskavinnuna í Suðuroynni merkir hetta, at framleiðslutíðin er sera stutt. Framleiðslan kann ikki byrja ov tíðliga í vikuni, tí tá verður góðskan á lidnu vøruni ikki nøktandi. Hartil má framleiðslan steðga í seinasta lagi tórsdag kl. 12.00, hetta fyri at fáa vøruna til Havnar við Smyrli, sum siglir av Tvøroyri kl. 14.00.

Um summarið broyta bæði Norrøna og Smyril fráfaringartíðina soleiðis, at siglt verður seinni tórsdag. Fyri framleiðsluvinnuna í Suðuroynni merkir hetta eina øking av framleiðslutíðuni uppá uml. 2 tímar.

**Tórsdag av Tvøroyri - ella umvegis Tórshavn seinnapart fríggjadag**

Tórsdag siglir Skipafelagið av Tvøroyri og seinnapartin fríggjadag av Havnini, fyrst til Scrabster og síðani til Hirtshals. Henda leiðin sýnist at vera tann besta fyri framleiðsluvinnuna í Suðuroynni, tí vinnan fær meiri framleiðslutíð. Hartil er fyrsta uppskipingarhavn Scrabster í Skotlandi, og skuldi vøran tá havt møguleika at vera frammi hjá kundum á evropeiska meginlandinum mánamorgun.

Hinvegin er logistikkurin og prísurin á logistikkinum úr Scrabster og í Norðurskotlandi so vánaligur, at kundarnir ikki vilja hava vøruna henda vegin. Leiðin víðari úr Scrabster til suður Onglands og evropeiska meginlandið er ov dýr og er eisini ov ofta óálítandi, verður m.a. víst á á Delta Seafood.

Eftir Scrabster er Hirtshals næsta uppskipingarhavn á hesari farmaleiðini. Men tá verður vøran ikki frammi á evropeiska marknaðinum fyrr enn ónsmorgun, og merkir hetta

eisini, at góðskan á vøruni tá er ivasom. – Og ber tað sostatt illa til hjá framleiðsluvinnuni í Suðuroynni at brúka hetta alternativið til avskiping av feskum fiskaúrdráttum til evropeiska marknaðin.

**Góð farmaleið við gamla Smyrli til Skotlands**

Í tíðarskeiðinum frá mars 1992 til mars 1997 var ein farmaleið til Skotlands, sum gamli Smyril sigldi. Siglt varð av Tvøroyri fríggjadag seinnapart og beinleiðis til Aberdeen, við komu í Aberdeen leygardag. Hetta var ein álítandi farmaleið, hvat leveringstryggleika viðvíkur, umframt at flutningskostnaðurin var kappingarførur – og eru hetta fortreytir, sum eru alneyðugar fyri at kunna uppbyggja ein marknað og fyri at fáa best gjørligan prís fyri vøruna.

Fyri flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni, sum framleiddu feskar fiskaúrdráttur, var hetta ein góð farmaleið. Fráferðin fríggjadag seinnapart førdi við sær, at feksfiskaframleiðarar høvdu nóg mikið av framleiðslutíð og harvið kundu fáa kontinuitet í framleiðsluna. Hetta var sjálvsagt eisini við til at gera framleiðsluna rentabla. Men hendan leiðin var tó, sum kunnugt, politiskt niðurløgd í mars 1997.

Í dag er støðan tann, at man samanumtikið kann siga, at vánaligu flutningsmøguleikarnir føra við sær, at flaka- og fiskivinnan á landi í Suðuroynni ikki hevur eins góðar fortreytir og fyrr til at leggja seg eftir at framleiða feskar fiskaúrdráttir til evropeiska marknaðin. Hóast hetta, so framleiðir ein partur av vinnuni í oynni feskar fiskaúrdráttir, hetta helst fyri vinna teir marginalar, sum hóast alt kunnu vera í at framleiða feskt.

## *Aðrir møguleikar*

Tá tosað verður um, hvørjir tillagingarmøguleikar eru, so eigur dentur eisini at leggjast á, at nakrir av tillagingarmøguleikunum, sum vístir eru á omanfyri, taka tíð og sum so ikki kunnu roknast sum stuttsiktaðar loysnir – heldur er talan um miðal- ella langsiktaðar loysnir. Her verður serliga hugsað um arbeiði við at vinna djúpvatnstrolarunum størri veiðurættindi, t.d. í fremmandum sjógvi og ætlanirnar um

ein feskfiskadepil í Suðuroynni. Hvat viðvíkur broytingum í hjáveiðukvotunum hjá djúpvatnstrolarunum, so kunnu hesar kvotur broytast við stuttum skoðbráði, um politiskur vilji er til tess.

## Tungolja, partroling, stuðul

Av øðrum møguleikum fyri tillaging, sum djúpvatnstrolararnir hava, eru eisini loysnir, sum vit longu kenna í Føroyum. Ein møguleiki er, at djúpvatnstrolararnir eins og nakrir av rækju-, flakatrolarunum og nótaskipunum leggja um til tungolju. Orsøkin til, at lagt verður um til tungolju, er, at tungoljan er nakað bíligari enn vanlig gassolja. Og fyri at kunna brenna tungolju skulu gerast íløgur í broytingar av maskinuni. Ein reiðari sigur í eini samrøðu, at tað er trupult at meta um, í hvønn mun djúpvatnstrolararnir vinna nakað burturúr at leggja um til tungolju. Djúpvatnstrolararnir eru allir lutfalsliga gamlir og krøvini til viðlíkahald av maskinunum verða helst væl størri, um lagt verður um til tungolju. Hartil er talan um eina lutfalsliga stóra íløgu. Ein annar trupulleiki er, at tú ikki kann bunkra tungolju hvar sum helst í landinum – eins og tú kann við gassolju.

Ein annar tillagingarmøguleiki er, at djúpvatnstrolararnir fara at partrola, eins og teir smærri ísfiskatrolararnir fóru at gera mitt í 1980unum. Umboð fyri eitt av feløgunum aftan fyri djúpvatnstrolara í Suðuroynni vísir í samrøðu á, at spurningurin er, um tað ber til at troyta miðini á djúpum vatni í sama mun við partroling sum við vanligari djúpvatnstroling. Hartil koma eisini ein long røð av praktiskum trupulleikum, ikki minst orsaka av, at tað í flestu førum er eitt reiðarí fyri hvønn djúpvatnstrolara, meðan teir flestu partrolararnir par-vís hoyra til eitt reiðarí.

At enda er eisini møguleiki fyri, at man politisk ger av at finna eina loysn fyri trupulleikunum, sum djúpvatnstrolararnir kunnu koma í. Hetta varð gjørt í samband við, at rækjuflotin kom í trupulleikar, tá Løgtingið gjørdi av at veita rækjuflotanum endurgjald fyri eyka útreiðslur og mista fiskitíð (www.logting.fo). Í hesum sambandi er helst fleiri møguleikar fyri loysnum – og kann, sum nevnt, skiljast ímillum stuttsiktaðar loysnir og loysnir uppá longri sikt, har tær stuttsiktaðu loysnirnar loysa herognú trupulleikar, meðan loysnir uppá longri sikt kunnu virka fyri meiri støðugum

viðurskiftum yvir eitt longri áramál. Loysnir, sum kunnu virka við til at djúpvatnstrolaraflotin ikki svinnur burt í onki (eins og rækjuflotin gjørdi) til óbótaligan skaða fyri fyritøkur, vinnu, fólk og húsarhald í Suðuroynni.

## Samandráttur

Seinasta 1-2 árini - og ikki minst teir seinastu mánaðirnar - hava hækkandi oljuprísir verið ovast á breddanum í føroysku fjølmiðlunum eins og í fjølmiðlum kring allan Heimin. Fyri Føroyar er støðan við hækkandi oljuprísum sera aktuell, hetta bæði fyri húsarhald og fyri vinnulív. Hvat vinnuni viðvíkur er tað serliga fiskiflotin, sum verður hart raktur, og hava vit eisini seinastu árini sæð, hvussu talið av rækjuskipum, millum annað orsaka av høgum oljuprísum (men eisini orsaka av vánaligum prísum á rækjum), er minkað niður í onki.

Ein annar partur av fiskiflotanum, sum eisini er sera útsettur av høgum og hækkandi oljuprísum, eru djúpvatnstrolararnir. Djúpvatnstrolararnir eru flest allir heimahoyrandi í Suðuroynni – ella vera mannaðir í oynni (10 av 12 djúpvatnstrolarum hava manning úr Suðuroynni). Afturat hesum kemur, at fiskiflotin í Suðuroynni seinastu 3 ártíggjuni hevur verið merktur av eini spesialisering innan djúpvatnstrolarar, og er hendan spesialisering vorðin enn týðiligari seinastu árini, nú 9 av 16 fiskiloyvum í Suðuroynni eru til djúpvatnstrolarar.

### *Djúpvatnstrolararnir stóran týdning fyri Suðuroynna*

Umleið 130 suðringar fiska við djúpvatnstrolarunum, og var manningarparturin í 2005 í miðal umleið 400.000 kr. – ella tilsamans 65 mio. kr. Harumframt koma so eisini lønir til reiðara, umsiting og egnar maskinmenn á landi. Á hendan hátt hava djúpvatnstrolararnir beinleiðis týdning fyri 100-130 húsarhald í Suðuroynni.

Fyri flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni hava djúpvatnstrolararnir eisini stóran týdning. Trý ártíggjur við djúpvatnstrolarum í Suðuroynni – har veiðan í stóran mun er løgd upp í oynni – hava ført við sær, at flaka- og fiskavirkini í ávísan mun hava lagt seg eftir at framleiða fiskaúrdráttir úr teimum fiskasløgum, sum júst djúpvatnstrolararnir fiska.

Í dag er virksemi á tilsamans 7 flaka- og fiskavirkjum í Suðuroynni, og siga tey størstu av hesum virkjunum – í einari kanning, sum Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi í apríl 2006 – at djúpvatnstrolararnir hava stóran týdning fyri rávørugrundarlagið. Delta Seafood á Tvøroyri og Fiskavirki í Hvalba vísa á, at millum 85% – 95% av

rávøruni í 1. ársfjórðingi í 2006 varð keypt beinleiðis frá djúpvatnstrolarunum. Føroya Fiskavirking í Vági og Føroya Fiskavirking á Tvøroyri keypa eisini stóran part av síni rávøru frá djúpvatnstrolarunum. Fyrsta ársfjórðing í 2006 keypti virki í Vági uml. 2/3 av síni rávøru frá djúpvatnstrolarunum, meðan virki á Tvøroyri í sama tíðarskeiði keypti uml. ½ av síni rávøru frá djúpvatnstrolarunum. Flaka- og fiskavirkini í Suðuroynni tóku fyrsta ársfjórðing í 2006 ímóti tilsamans smáum 7.000 tonsum. Av hesum vóru umleið 4.200 tons frá djúpvatnstrolarunum, svarandi til, at 60% av rávøruni var frá djúpvatnstrolarunum. Í hesum tíðarskeiði arbeiddu í miðal umleið 310 fólk á flaka- og fiskavirkjunum í oynni, og rindaðu virkini tilsamans umleið 14 mio. kr. í lønum.

Djúpvatnstrolararnir hava eisini stóran týdning fyri tann partin av tænastuvinnuni í Suðuroynni, sum hevur lagt seg eftir at veita tænastur til fiskiflotan. Talan er um eitt trolvirki, maskinverkstaðir og eitt lemmavirki. Trolvirkið Bergið í Hvalba hevur serliga lagt seg eftir at veita tænastur til djúpvatnstrolararnir, sum av somu orsøk hava stóran týdning fyri virksemi har. Umboð fyri ein maskinverkstað á Tvøroyri og ein maskinverkstað í Vági vísa á, at djúpvatnstrolararnir hava stóran týdning fyri teirra virksemi.

Samanumtikið hava djúpvatnstrolararnir stóran týdning fyri Suðuroynna. Beinleiðis á tann hátt, at nógv fólk eru lønt av djúpvatnstrolarunun. Óbeinleiðis við at djúpvatnstrolararnir eru ein týðandi partur av rávørugrundarlagnum á flaka- og fiskavirkjunum, umframt at djúpvatnstrolararnir skapa virksemi í tænastuvinnuni í oynni – og á tann hátt eru við til at halda nógv fólk í vinnu. Hetta merkir so aftur, at djúpvatnstrolararnir hava lutfalsligan stóran týdning fyri kommunu skattainntøkurnar hjá kommununum í oynni.

Djúpvatnstrolararnir teljast millum tær stóru fyritøkurnar í Suðuroynni, og eru teir tí eisini av týdningi fyri vinnulívið í oynni sum heild. Eins og greitt hevur verið frá hevur PF Steintór í Hvalba verið við til at ment og styrkt vinnulívið í Hvalba, eins og felagið eisini hevur sett pening í aðrar fyritøkur í oynni. Hetta er eitt dømi um, hvønn týdning fíggjarliga sterkar fyritøkur hava fyri eitt øki – og vísir hetta eisini, hvønn týdning feløg

sum t.d. PF Steintór kunnu hava fyri menningina av vinnulívinum í Suðuroynni sum heild.

### *Høgu oljuprísirnir ein vandi*

Seinastu 1-2 árini eru oljuprísirnir hækkaðir munandi, soleiðis at Listaprísurin - oljuprísurin fyri fiskiflotan – fyri tíðarskeiðið fram til apríl 2006 í miðal var 3,75 kr. pr. litur. Ikki er óvanligt, at reiðaríini samráða seg fram til ein avsláttur. Fyri djúpvatnstrolararnir er hesin í miðal 45 oyri pr. litur. Hóast hetta er kostnaðurin av oljuni ein tyngjandi partur av rakstrinum hjá djúpvatnstrolarunum. Raksturin hjá djúpvatnstrolarunum fer eisini í ár – og var tað helst eisini í fjør – at verða merktur av høgu oljuprísunum. Og um miðal oljuprísurin fram til apríl í 2006 – 3,30 kr. pr. litur – verður brúktur sum útgangsstøði og umroknaður til árini 2001-2004, so gerst myndin eisini greið. Í árunum 2001-2003 høvdu djúpvatnstrolararnir í miðal eitt avlop á millum 2 og 2,5 mio. kr. áðrenn avskrivingar og rentur. Í 2004 var miðal úrslitið áðrenn avskrivingar og rentur umleið 1,1 mio. kr. (roknskapirnir fyri 2005 eru ikki tøkir enn). Um miðal oljuprísurin fyri teir fyrstu mánaðirnar í 2006 (fram til apríl) verður umroknaður til árini 2001-2004, so hevði hetta ført við sær, at rakstrarúrslitið hjá djúpvatnstrolarunum hevði versnað munandi. Fyri árið 2001 hevði talan verið um uml. 1 mio. kr. í avlopi í miðal (áðrenn avskrivingar og rentur), meðan árini 2002 og 2003 høvdu givið umleið null, og árið 2004 givið eitt hall umleið 750.000 kr. í miðal. Um kapitalkostnaðurin – avskrivingar og rentur – varð tikin við, so hevði talan verið um eitt stórt hall fyri allan djúpvatnstrolaraflotan í nevnda tíðarskeiði.

### *Høgu oljuprísirnir leggja trýst á djúpvatnstrolararnir*

Eins og víst í Talvu 4 á síðu 17, so leggja høgu oljuprísirnir og forsøgn um hægri oljuprísir trýst á raksturin hjá djúpvatnstrolarunum. Forsøgn er um, at oljuprísurin longu í ár kann hækkað til 4,00 – 4,50 kr. pr. litur, og merkir hetta, at útreiðslurnar til olju og smyrjiolju verða munandi hægri enn áður. Vanligu rakstrarútreiðslurnar hjá einum djúpvatnstrolara eru umleið 180.000 kr. pr. túr – áðrenn brenniolju og smyrjiolju. Við einum miðal prísi á 4,00 kr. pr. litur verða oljuútreiðslurnar (brenniolja og smyrjiolja) tilsamans 300.000 kr. pr. túr. Hetta merkir, at rakstrarútreiðslurnar fyri ein vanligan túr eru umleið 480.000 kr.

Við einum hýruparti uppá 40% merkir hetta, at ein djúpvatnstrolari ein vanligan túr skal fiska fyri í minsta lagi 800.000 kr. fyri at dekka sjálvan rakstrarkostnaðin. Og tá eru avskrivingar og rentur ikki tiknar við. Um miðal avskrivingarnar og miðal renturnar verða roknaðar pr. túr, so er talan um uml. 45.000 kr. í avskrivingum og 23.000 kr. í rentum pr. túr.

Rakstarútreiðslurnar pr. túr hjá einum djúpvatnstrolara eru sostatt umleið 548.000 kr. Við einum hýruparti uppá 40%, merkir hetta, at ein djúpvatnstrolari í miðal skal selja fyri 913.000 kr. pr. túr fyri at svara hvørjum sítt – um oljuprísurin verður 4,00 kr. pr. litur. Og tá er onki eftir til forrentan av eginpeningi og konsolidering av felagnum.

Árini 2001-2004 hava djúpvatnstrolararnir í miðal fiskað 77,25 tons pr. túr. Miðalprísurin hevur hesi árini ligið um 10,00 kr. pr. kg. Við einum oljuprísi uppá 4,00 kr. pr. litur má miðalprísurin og/ella veiðunøgdin hækkað fyri at svara hvørjum sítt. Um tillagingin bara skal verða í prísinum, so skal miðalprísurin hækkað til umleið 11,80 kr. pr. kg. Um bara veiðunøgdin skal økjast, so skal nøgdin í miðal pr. túr økjast til 91 tons við einum miðalprísi á 10,00 kr. pr. kg. fyri at svara hvørjum sítt.

### *Tillagingarmøguleikar*

Eitt av lyklahugtøkunum í smb. við tær avbjóðingar, sum vinnulívið stendur yvirfyri, er hugtakið *tillaging*. Fyri djúpvatnstrolararnir eru møguleikarnir ikki so nógvir, hvat tillagingum viðvíkur, men teir møguleikar, sum eru, fevna t.d. um tillaging í veiðunøgd, prísi, produktmix.

Broytingar í fortreytunum hjá djúpvatnstrolarunum hava ført við sær, at trupult er at økja um veiðunøgdina. Til dømis eru hjáveiðukvoturnar skerdar seinastu árini; harumframt eru møguleikarnir fyri til at fiska í fremmandum sjógvi ikki góðir. Djúpvatnstrolararnir hava annars gjøgnum tíðirnar vunnið Føroyum søgulig rættindi á fiskileiðum og hava fiskað bæði undir Íslandi, í Barentshavinum, í Irmingarhavinum, í

Eystur-Grønland og í Norðsjónum. Í dag eru møguleikarnir hjá djúpvatnstrolarunum at fiska í fremmandum sjógvi sera avmarkaðir, fyri ikki at siga ongir.

Prísur og produktmix er ikki parametrar, sum skipini sum so hava stóra ávirkan á. Góðskan á fiskinum umborð kann tó vera við til at geva ein hægri prís enn miðalprísin. Produktmixið – tvs. samansetingin av fiskasløgunum, ið veidd verða – royna skipini hvør í sínum lagi at tillaga soleiðis, at mest fæst burtur úr hvønn túr. Hetta er í stóran mun knýtt at royndum og dugnaskapi, men hartil eisini knýtt at rættindum, sum politiskt vera givin djúpvatnstrolaraflotanum. – Og har eru broytingar gjørdar seinastu árini, sum avmarkað møguleikarnir hjá djúpvatnstrolarunum.

Ein onnur tillaging hjá skipum og vinnuni í Suðuroynni hevði verið at styrkt um møguleikarnir at framleiða feskar fiskaúrdráttir í oynni. Flaka- og fiskavirkini eru í stóran mun lagað eftir at framleiða feskt, men avskipingarmøguleikarnir til evropeiska meginlandið – marknaðin – eru tó ein forðing fyri optimalum umstøðum.

Av øðrum møguleikum fyri tillaging er umlegging til tungolju, sum nakrir av rækju-, flakatrolarunum og nótaskipunum longu hava gjørt. Ein onnur møgulig tillaging er, at djúpvatnstrolararnir fara at partrola, men tað er tó ivasamt, í hvønn mun tað ber til at troyta miðini á djúpum vatni við partroling.

Ikki minst, so er eisini møguleiki fyri, at politiski myndugleikin fyriskipar eina loysn – eins og gjørt varð í smb. við at rækjuflotin kom í trupulleikar. Har eru helst fleiri møguleikar, bæði uppá stutt sikt og uppá longri sikt. Sum gongdin er nú og væntandi verður næstu mánaðirnar, so er tað ikki óhugsandi, at neyðugt verður við loysnum, og eigur politiski myndugleikin helst at fyrireika seg upp á hetta longu nú. – Loysnir, sum kunnu virka við til, at djúpvatnstrolaraflotin ikki svinnur burtur í onki, til óbótaligan skaða fyri fyritøkur, vinnu, fólk og húsarhald í Suðuroynni.

## Bókmentir og keldur

Føroya Fiskimannafelag. 2006. *Ársfrágreiðingini hjá Føroya Fiskimannafelag fyri árið 2005.*

Rasmussen og Weihe. 2004. *Roknskapargreining av fiskiflotanum 2000-2004.*

Business-Line: www.business-line.fo

Fiskiveiðueftirlitið: www.fse.fo

Føroya Landsstýri: www.tinganes.fo

Føroya Løgting: www.logting.fo

Føroya Shell

Hagstova Føroya: www.hagstova.fo

Suðuroyar Sparikassi